Rannvá Joensen í midnáttarrøðu á Norðoyastevnu:

# » - Lat okkum fylkjast um oyggjarnar fast…«



**Niðanfyri prenta vit midnáttarøðuna, sum Rannvá Joensen, varaskúlastjóri í Ósaskúlanum, helt á Norðoyastevnu**

Góðu norðingar og góðu norðoyastevnugestir!

Ja, norðoyastevnan, so kom hon umsíðir. Fyrsta veruliga summarstevnan á árinum. Men hon kom við landssynningi og oysandi regni.

Vit hava júst lagt maimánaða aftur um okkum. Ein maimánaða, sum vit aftan á ein langan, myrkan og serstaklinga kaldan vetur við nógvum kava, høvdu so stórar vónir til. Vónir um, at mai mánaði fór at bera okkum lýðku, gróður og ljósar summarnætur.

Hesaferð gjørdist tó mai okkum ófýsin, kaldur og vátur. Men hóast oysandi regnið í dag, er tað kortini lýsnað. Og norðoyastevnan, hon er komin. Og skulu vit trúgva veðurfrøðingunum, kunnu vit vænta, at sólarglóttar fara at trongja seg gjøgnum mjørkan í morgin. Jú, summarið er helst í nánd kortini...

Og kemur summarið ikki á norðoyastevnu, so man tað tó fara at koma. Vit hava jú so gott tol at bíða. Tað prógvaðu vit undir kappróðrinum í dag. Men tað er kanska tí, at vit eru so von at bíða – eftir góðum veðri, – eftir samgonguni og ikki minst eftir Dúgvuni.

Av tí, at bæði foreldur míni vóru av bygd, minnist eg væl tær stóru fyrireikingarnar og stóru stákanina at taka ímóti skyldfólkum og kenningum, sum komu úr bygdunum til Klaksvíkar at halda norðoyastevnu.

Míni barnaminni um norðoyastevnu eru kappróðurin. Vit plagdu sum heilt smá at standa niðri á bedingini og hyggja at. Men so hvørt, sum vit eldust, otaðu vit okkum longri og longri heim í býin – til vit einaferð til endans stóðu her heimi í Vágstúni. Mitt í norðoyastevnuni.

Og nú, ár 2002, standa vit aftur her í Vágstúni í góðum lag. Vit heilsa hvørjum øðrum og biðja góða norðoyastevnu – júst á sama hátt, sum vit hava gjørt so ofta fyrr.

Stór er stákanin eisini enn til norðoyastevnu, hóast tað verður stákað heldur ørðvísi í dag. Vit hava seinastu dagarnar – og summi ikki fyrr enn á middegi, tá handlarnir stongdu, roynt at fingið tað seinasta upp á pláss. Tað ræður jú um at vera klárur til norðoyastevnu og at hava dyrnar opnar.

Men óiva liggur kortini onkur ópussaður føroyskur knappur, sum glapp burturímillum í stevnustákanini. Men tað er ein dagur aftur í morgin.

Hjá teimum, sum fyrireika stevnuna, ítróttarfeløgum, kommununi og øðrum, hevur stákanin ikki verið minni enn heima við hús. Tað síggja vit millum annað í norðoyastevnuskánni og okkara stevnuskrýdda býi.

Norðoyastevnan er ein partur av okkara samleika – eingin ivi um tað. Flestu okkara kenna seg aftur í tiltøkunum. Onkur í skrúðgonguni, onkur á leikvøllinum og onkur í kappróðrarbátinum.

Og vit prógva við at standa her í kvøld, at hóast samfelagsrákið kring megin partin av knøttinum er vorðið alt meira sjálvsøki, ber framvegis til í felag at skapa eina góða norðoyastevnu. Og tað ber eisini til at luttaka í ítróttarkappingunum og vera við í fremstu røð. Tað sóu vit millum annað á kappróðrarúrslitunum í dag.

Norðoyastevnan og tiltøkini á hesari stevnu eru ein felags samleiki, identitetur, hjá okkum øllum norðoyingum, sum standa her í kvøld.

Og júst hesin felags samleikin er ein týdningarmikil gripur, sum tað er umráðandi at varðveita. Vit síggja millum annað prógv um hetta í frágreiðing, sum okkara egni Granskingardepul lat úr hondum fyri tíð síðani. Í hesi vísindaligu frágreiðing varð millum annað staðfest, at tað var samanhaldið og viljin, ið gjørdi, at ávís øki – millum annað Noroyggjar – ikki heilt bukkaðu undir í hørðu búskaparkreppuni tíðliga í nítiárunum.

Men hvør er so hesin felags samleikin? Hvat er tað, sum liggur aftan fyri felags samleikan og viljan?

Jú, tað er millum annað tað at halda norðoyastevnu í felag. At vit í felag standa aftan fyri okkara kappróðrarmanningar og stuðla teimum. At vit í felag standa kring fótbóltsvøllin. Og at vit eisini í felag kenna okkum aftur í hesum tiltøkum. Ja, samanumtikið tað, at vit í felag eru við til at gera okkara bý og norðoyggjar sum heild til eitt gott samfelag at liva í.

Fleiri av norðoyastevnugestunum eru komnir um Leirvíksfjørð, og hava á egnum kroppi merkt tann totala ruðuleikan, ið valdar, tá tað ræður um ferðasambandið. Men soleiðis verður tíbetur bert fáar norðoyastevnur afturat. Ein stór broytingartíð stendur fyri framman. Um fá ár verður fast samband til meginlandið.

Eingin ivi er um, at hetta verður ein stórur fyrimunur. Men samstundis skulu vit minnast til, at undirsjóvartunnilin eisini verður ein stór avbjóðing fyri okkum. Ein stór avbjóðing, sum setur stór krøv til samanhaldið og stór krøv til samleikan. Vit skulu minnast til, at við undirsjóvartunnilinum verður tað eisini léttari hjá okkum at fara úr norðoyggjum.

Og tí kunnu vit siga, at Klaksvík her kemur at standa sína roynd – sína manndómsroynd sum miðdepil í norðoyggjum. Vit mugu koma eitt stig víðari á leiðini. Taka avbjóðingarnar og prógva at dugur er í okkum.

Tá undirsjóvartunnilin um fá ár er veruleiki, fáa vit eina stóra avbjóðing, sum skal gera av, um vit klára okkum í kappingini, ella um vit í framtíðini skulu standa á síðulinjuni og bara hyggja at.

Og hvussu standa vit so royndina ???

Jú, okkara felags stevna má vera at koma í fremstu røð á skúlaøkinum, sosiala- og vinnuøkinum. Og ikki minst á mentanarøkinum. Samanumtikið at gera Klaksvík til eitt spennandi stað at vera í og koma til.

Og tað gera vit – við samanhaldinum og samleikanum sum styrki. Tá fólkið trívist, ja so mennast og trívast norðoyggjar eisini.

Mest umráðandi er, at trongskygni, øvund og sundurlyndi ikki fær fastatøkur á okkum. Men at vit í staðin víðka okkara tolsemi, so pláss verður fyri okkum øllum her í Klaksvík. Okkara sjónarringur skal víðkast, og vit skulu ikki vera bangin at ganga nýggjar leiðir.

Vit skulu minnast til, at sjálvsdyrkanin og jagstranin eftir tí besta til egnan fyrimum mennir einki samfelag. Liggja vit í sjálvdrátti, koma vit ongantíð á mál. Vit vita jú, at:

– Vit kunnu eiga nógvar milliónir uttan at vera rík.

– Vit kunnu hyggja uttan at síggja.

– Vit kunnu lurta uttan at hoyra

– Og vit kunnu eiga fínastu sofurnar uttan at gesturin situr væl.

Skulu vit vera við í róðurinum og koma á mál, er neyðugt at hava áralag. Vit mugu lata okkum úr tronga vestinum av øvund, sjálvsøkni og maktarloysi. Vit mugu ikki lata líkasæluna fáa vald á okkum. Men ístaðin tora at ganga nýggjar leiðir við tolsemi og vilja stavn um stavn.

Vit eru noydd at fara í »INNARA LUMMAN« eftir loysnunum, sum byggja á samleikan, viljan og felagsskapin.

Vit skulu skapa okkum eitt samfelag, har tað í framtíðini eisini hevur virði at halda norðoystevnu saman – bæði andaliga og verðsliga.

Lat meg tí enda aftur á bedingini í gamla grannalagnum við hesum ørindinum hjá Martini Eysturdal:

Norðoyingar, suðringar, eystur og vestur,  
lat okkum fylkjast um oyggjarnar fast,  
tvinnast vit saman, ei strongurin brestur,  
tvídráttarhuganum fáa vit bast.  
Ein fyri øllum, og øll fyri ein!  
herróp má vera um gróður skal trívast,  
tað gevur tjóðini mergin í bein,  
sannførast, búnast, upplívast.

Framhaldandi góða norðoyastevnu øll somul!






**Farmadeildin søkir**

**SØLUFÓLK**

Søkt verður eftir sølufólki til farmadeild okkara.

***Arbeiðsuppgávur:***
Uppsøkjandi søluarbeiði, herundir søla av tænastum innan farma-flutning og kundarøkt.

***Førleiki:***
Tann, ið settur verður, skal hava góð samstarvsevni og helst hava royndir í søluarbeiði.
EDV-kunnleiki á brúkarastøði er ein treyt.

***Løn:***
Sambært avtalu.

Starvið verður at seta skjótast til ber.

Meira fæst at vita við at ringja tel. 345962/ 63 og spyrja eftir Jónfinni ella Heðini.

Umsókn við møguligum prógvum og upplýsingum um royndir annars skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. juni 2002.

team85

**SMYRIL LINE CARGO**
**Postsmoga 370 • 110 Tórshavn**


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2094, P/F Line Fish, 470 Eiði.

Nevnd:
Farin frá sum formaður: Sigmund Dam, 460 Norðskáli.
Innkomin sum formaður: Regin Olsen, Sólteigur 9, 100 Tórshavn.
Farin úr nevndini: Dánjal Magnussen, 340 Kvívík.
Innkomin í nevndina: Sofus í Selvindi, 490 Strendur.

Skráseting Føroya tann 4. juni 2002

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2409, P/F Vaðhorn Seafood, 490 Strendur.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Dánjal Magnussen, 340 Kvívík.
Innkomin í nevndina: Rúni Berg, Grannatún, 600 Saltangará.

Skráseting Føroya tann 4. juni 2002

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2792, Sp/f frá 2/11-1998, 350 Vestmanna.

Stjórn:
Innkomin sum stjóri: Elsa Jacobsen, 350 Vestmanna.

Skráseting Føroya tann 4. juni 2002

Kristin Balle

---


Toll- og Skattstova Føroya

## Málsviðgeri

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
- skattalógina
- tolllógina
- mvg-lógina
- kolvetnisskattalógina
- avgjaldslógirnar,

eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja rakst-urin.

Á Eysturoyar Øki, har viðkomandi kemur at starvast, eru 20 starvsfólk.

*Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo*

*E-mail: tollskatt@tollskatt.fo*

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, er starv leyst at søkja til setan skjótast til ber.

**Høvuðsuppgávur**
Málsviðgerð í samband við innkrevjing av barnapengum v.m., herundir skráseting av krøvum og samskifti við persónar um gjalding av krøvum. Eisini skal viðkomandi hjálpa til við innheintingarmálum annars.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal helst hava skrivstovuútbúgving, HH-prógv ella líknandi. Viðkomandi skal vera fyrikomandi og arbeiðssamur og kunna arbeiða sjálvstøðugt. Kunnleiki til EDV á brúkarastøði er ein treyt.

**Vit kunnu bjóða**
- eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi
- flextíð
- sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.
Núverandi setanarøkið er Eysturoyar Øki, men fevnir annars um Fíggjarmálastýrið og stovnar undir tí, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.
Viðkomandi, ið settur verður, skal vera fúsur at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og skattstovan bjóðar bæði á stovninum og uttan fyri stovnin eitt nú á handilsskúla v.m. og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar.

**Nærri frágreiðing um starvið** fæst við at venda sær til Ingolf Lamhauge á tlf. 44 85 88.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, í hendi í seinasta lagi:

**17. juni 2002**

**Toll- og Skattstova Føroya**
Eysturoyar Øki
Postsmoga 225
FO-600 Saltangará



**Brúktur Audi A4**
**bilurin er í góðum standi**



**Audi A4 1,6**
Árg. 04/95 Km.102.700 Lit bláur met.
**Útgjald bert 30.000,-** / 148.000,-
Hevur sóltak og sleipikrók.
Bilurin er í góðum standi.

**Bilfríðkan**
við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Tórshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo



Toll- og Skattstova Føroya

**Frá Toll- og Skattstovu Føroya**

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
- skattalógina
- tolllógina
- mvg-lógina
- kolvetnisskattalógina
- avgjaldslógirnar,

eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar røkja raksturin.

www.tollskatt.fo

tollskatt@tollskatt.fo

Frítíðargrunnurin, Trygdargrunnurin og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin eru nú fluttir til Suðuroynna.

Grunnarnir verða umsitnir av Toll- og Skattstovu Føroya, Suðuroyar Øki, og halda til á Økisskrivstovuni á Tvøroyri.

Telefon- og avgreiðslutíð er:

| | |
|---|---|
| mánadag – friggjadag: | kl. 09.00 – 15.00 |
| hósdag tó: | kl. 09.00 – 17.30 |
| Telefon: | 37 10 51 |

**Argir, 4. juni 2002**

**Toll- og Skattstova Føroya**